# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Bitland – Samvit og Jarðfeingi

Tað eru daprar útmeldingar, sum koma í hesum døgum. Vit eru við at fiska niður fleiri av okkara fiskastovnum, oljan er vorðin so dýr, at tað kann ikki løna seg at veiða, skip verða løgd, virki lata aftur og soleiðis kundi verið hildið fram. Døpur útlit fyri partar av vinnuni, um somu tíð sum tað eisini eru glottar. Sundaberg komin heim við fullari last eftir bara seks vikum.

Seinasta tilmælið frá Fiskirannsóknarstovuni er rættiliga alarmerandi. Vit mugu gevast ella avmarka munandi um veiðuna eftir ávísum fiskasløgum. Samtíðis mæla bæði politikarar, búskaparfrøðingar og fiskifrøðingar til at minka um partar av fiskiflotanum. Stjórin á Fiskirannsóknarsstovuni ávarar so staðiliga og vísir á, at vit eru við at koyra okkum út av eggini. Samstundis stríðast Faroe Seafood og aðrar vinnufyritøkur á landi fyri at yvirliva.

Um somu tíð eru tó eisini ljósglottar fyri framman. Tað eru útlitini fyri, at aðrar alternativar vinnur kunnu mennast. Hetta vita vit tó tekur tíð. Men tað er umráðandi, at tað ikki bara verður fokuserað uppá fiskivinnuna, hóast hon er høvuðsálitið. Vit mugu brúka orku eisini til at finna nýggjar gongdar vinnuleiðir. Og her er Bitland samtakið eitt av svarunum. Felagsskapurin roynir at birta lív í nýggjar vinnur her á landi. Samvit er enn ein íbirtari. Stovnurin roynir at samskipa og menna ferðavinnuna. Ì triðja lagi kunnu vit taka fram Jarðfeingi, sum roynir at fremja oljuleitingina við Føroyar, og sum er enn ein roynd at gera okkum minni heft at fiskivinnuni.

Spurningurin vil altíð vera í hvønn mun samfelagið vil brúka orku uppá at birta lív í nýggjar vinnur. Hetta er ein spurningur um hugburð og hugflog, um treysti og vilja, um at tora at bróta upp úr nýggjum. Privatu fyritøkurnar megna hetta ikki einsamallar. Her er tað sera umráðandi, at tað almenna vil spæla við og ikki sparir á økjum, sum seinni kunnu gerast týðandi partur av búskapinum. Bitland, Samvit og Jarðfeingi eru bert trý ítøkilig dømi um felagsskapir og stovnar, sum vit hava nógv brúk fyri – meina vit nakað við tað at fáa samfelagnum fleiri búskaparlig bein at standa á.

**Sosialurin**

## Jørgin, Jørgin

**JENIS AV RANA**
v. Miðflokkin



Ætli ikki at brúka nógva tíð til verju av politikki samgongunnar, hugsi betri man verða at lata tíðina vísa úrslitini, og sum er, er bert stuttur teinur rógvin.

Men nakrar viðmerkingar loyvi eg mær at geva sosialpolitiska leiðara fólkafloksins, sum m.a. í vikuskiftisdimmuni roynir at sáða iva um familju- og eldrapolitikk samgongunnar. Við vilja, uttan iva, nevnir hann ongar av teim batum, framdir eru hesa stuttu tíð, vit hava virkað ( t.d. økt barsislfarloyvi, stuðul til einsamallar forsyrgjarar, bygging av sambýlum til sinnisveik í Vági og Havn, ígyldisseting av lóg um endurgjaldsábyrgd v.m., v.m ). Og tilvitað nevnir hann ikki alternativa politikkin, sum egni flokkur hansara ynskir førdan. Fari tí stutt at minna hann á hendan- við niðanfyri at endurgeva beinleiðis úr álitinum til løgtingsfíggjarlógina fyri 2008. Her biður fíggjarnevndarumboðið fyri flokk hansara teir 33 løgtingsmenninar um at atkvøða fyri, at:

minka játtanina til barnatænastuna (t.e. heilsufrøðingakanningar av børnum) við: kr. 1,2 mió
- ættleiðingarstuðilin við: kr. 300.000
- stuðulin til influenzakoppseting av teim yvir 67 ár við: kr. 200.000
- játtanina til eldrarøkt við: kr. 3 mió.
- játtanina til laknakanning av børnum við: kr. 400.000
- játtanina til stuðulstænastuna við: kr. 1.2 mió
játtanina til bókasøvn við: kr. 500.000
stuðulin til fyriskipanir fyri heimleys við: kr. 1 mió
- lestrarstuðulin við: kr. 3.5 mió
- játtanina til skúladepilin í suðri við: kr. 4 mió
- játtanina til fólkaskúlan við: kr. 1 mió
- játtanina til tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu við: kr. 100.000
- játtanina til vanliga forsorg við: kr. 10 mió.
- játtanina til sjúkratrygd við: kr. 1.5 mió
- játtanina til inntøkutrygd fiskimanna við: kr. 2 mió

Tíbetur vísti stórur partur av løgtingfólkum hesum ynskjum frá sær. Ábyrgdarkenslan fyri eisini teimum á niðaru rókunum sigraði - tíbetur.

Og veruligu orsøkina til umsorgan fólkafloksformansins fyri tinglýsingargjaldinum munnu flestu vita.

## Snildir landsstýrismenn

**LASSE KLEIN**



**…einskilja Atlantic Airways fyri síðani at taka fíggjarliga grundarlagið undan felagnum**

Við beráddum huga fóru teir undir at einskilja Atlantic Airways. Endamálið var helst at fáa pening í ein alsamt slunknan landskassa.

Teir fingu, eftir øllum at døma ørvitisknokkar at seta partapening í felagið, og landsstýrið fekk á henda hátt milliióna upphæddir, og tá teir so høvdu fingið tær, byrjaði niðurteljingin, og skuldi eisini vera við til at fíggja nógv umtalaðar yvirtøkur.

Nú skuldu tey, sum høvdu keypt partapening í felagnum, lumpast. Teir syrgja eisini fyri at fíggjarliga avkastið ikki skal vaksa, men minka. Teir taka grundarlagið undan tax-fríu søluni, og vera tí beinleiðis orsøkin til, at avlopið minkar munandi, ella heilt hvørvur.

Í einum høggi taka teir fíggjarliga grundarlagið undan – ikki bert Atlantic Airways, men eisini Smyril Line, og taka hvørkratak um ferðavinnuna í síni heild, og seta alt trúvirði í vanda hjá almenna nationala stoltleikanum.

Teir hava eisini syrgt fyri, at tað er ov seint at iðra seg um keypið av partabrøvunum, og eisini ljóðar, at einskiljingin er heilt steðgað upp, og at fleiri partabrøv verða ikki at síggja á marknaðinum í bræði.

Sølan av teimum partabrøvum, sum longu eru seld, verður heldur ikki lætt at umseta, aftan á gølukenda framferðarháttin; at máa fíggjarliga støðið undan Atlantic Airways, nú tax-fría sølan skal steðgast við eini einfaldari kunngerð, og tá verður helst heldur eingin áhugi at keypa ella umseta partabrøvini í felagnum.

Tá spurningurin um einskiljingin av Atlantic Airways tók seg upp, vóru tað mong, sum vóru í iva, um hetta var rætta gongdin, men politiski meirilutin vildi tað øðrvísi. Prosessin byrjaði.

Hon er eftir øllum at døma steðgað aftan á at fleiri hundrað ella túsund føroyingar og útlendingar hava ognað sær partabrøv.

Snildir landsstýrismenn, sum eingi mørk kenna sær fyri at útvega landskassanum løtuvinning, og at lumpa føroyingar og útlendingar at seta pening í felagið, fyri síðani at taka fíggjarliga grundarlagið undan íløguni. Snilt, men ørvitiskent hugflog.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.